*ALS gongur nýggjar leiðir:*

# Tólv føroyingar umskúlaðir til borifólk

*Skulu føroyingar manna boripallarnar, tá teir koma á føroyskt øki um nøkur ár, tá er sera umráðandi longu nú at útbúgva føroyingar til at arbeiða umborð á boripallum sigur norðmaðurin Georg Balazs, sum hevur staðið fyri einum skeiði fyri 12 føroyingar. ALS skipanin stílar fyri.*

Jan Müller

Í hesi vikuni skulu 12 teir fyrstu føroyingarnir til próvtøku í oljuboring og øðrum arbeiði umborð á einum oljuboripalli.

Tað er Arbeiðsloysisskipanin, sum hevur tikið stig til hetta nýggja og áhugaverda tiltakið. Saman við norsku fyritøkuni North Sea Drilltrainer hevur ALS-skipanin staðið fyri einum 2 mánaða longum skeiði, har 12 arbeiðsleysir føroyingar hava fingið undirvísing í arbeiðinum umborð á einum boripalli.

Herfyri vóru teir 12, sum eru handverkarar av ymsum slag, navigatørar og hava aðra útbúgving, í Stavanger í ein mánað. Har vóru teir á einum krevjandi skeiði um trygd umborð á boripallum. Hetta skeið krevst fyri at kunna arbeiða umborð á einum boripalli. Harafturat var frálæra í boriarbeiði. Út frá teimum fyrstu royndunum varð mett, at tað fór at vera lættari og bíligari at halda restina av skeiðinum í Føroyum, so avgjørt varð at fáa undirvísaran, borisertfrøðingin Georg Balazs til Føroya at fullføra skeiðið.

Her hava teir 12 næmingarnar so sitið á skúlabonki á Tekniska Skúla í Havn og eru nú klárir at fara upp til próvtøku.



*Føroyskir handverkarar verða umskúlaðir at arbeiða umborð á oljuboripallum. mynd kalmar*

**Fyrsta floks næmingar**

-Eg eri ómetaliga glaður fyri at hava upplivað Føroyar og má siga, at hetta hevur verið eitt framúr gott skeið. Næmingarnir eru fyrsta floks, og eg ivist ikki eina løtu í, at okkurt gott fer at spyrjast burtur úr hesum tiltakinum sigur Georg Balazs, sum heldur arbeiðið



*Georg Balazs fegin um at undirvísa føroyingum.*



*Pauli Einarson hevur sum ráðgevi hjá ALS gjørt eitt sera gott og týðandi arbeiði. Eg vóni, at slík fólk við initiativi og virkisfýsni fáa ta neyðugu uppbakkingina í føroyska samfelagnum, tí tað fer at tæna føroyskum áhugamálum í eini oljuvinnu her heldur Georg Balazs. Mynd jan*



*Teir tólv føroyingarnir, sum hava verið á boriskeiði. Aftast f.v. Georg Balazs, lærari, Johan Dalsgaard, Páll av Teiginum, Magni Jacobsen, Johan Poulsen, Hans Mortensen og Jákup Eli Jensen. Fremst f.v. Kristian Storhamar, Jón S. Løvhøjen, Bjarni Poulsen, Óttar í Funningsstovu, Jóannes Nielasen og Kári Magnussen. Mynd kalmar*

▶▶

*Á oljuskeið umborð á Teistanum og í Lopra:*

# Løgmaður á skúlabonk

*Løgmaður, løgmansstjórin, starvsfólkið á Oljufyrisitingini og limirnir í Oljuráðleggingarnevndini fara í morgun við Teistanum til Suðuroyar, har greitt verður frá jarðfrøði og oljuboring*



*Edmund Joensen, løgmaður og nýggi løgmansstjórin Marjun Hanussardóttir á skúlabonk at kunna seg við jarðfrøði, oljuboring og forkanningar. Mynd kalmar*

Jan Müller

Føroya løgmaður skal nú aftur á skúlabonk. Hesaferð umborð á strandfaraskipinum Teistanum og á borplássinum í Lopra. Evnið er jarðfrøði, oljuboring og forkanningar.

Tað eru Alex Buvik, sum herfyri varð settur í starv á Oljufyrisitingini, ið stendur fyri skeiðnum. Saman við norðmanninum Georg Balazs, ið hevur undirvíst arbeiðsleysum føroyingum í borarbeiði, hevur hann lagt skeiðið til rættis.

Tá Teitin fer av Havnini til Suðuroyar í dag eru løgmaður Edmund Joensen, nýggi løgmansstjórin Marjun Hanussardóttir, limirnir í Oljuráðleggingarnevndini og starvsfólkini á Oljufyrisitingini, tilsamans 30 fólk, við skipinum.

Endamálið við ferðini er eitt grundskeið í jarðfrøði, oljuboring og forkanningum.

Alex Buvik, sum í arbeiði sínum á Oljufyrisitingini tekur sær av øllum spurningum, sum hava við trygdina at gera, sigur við Sosialin, at tað er sera umráðandi, at øll tey fólkini, sum arbeiða við oljuspurningum verða kunnað um hetta økið. At løgmaður er við er heilt natúrligt, tí tað er hann, sum umsitur hetta málsøkið í Tinganesi.

**Lopransboringin eitt gott høvið**

Alex Buvik heldur eisini, at tað er rætt at brúka tað góða høvið vit hava í løtuni, har tað verður borað í Lopra. Vanliga verður borað til havs og tá er ikki so lætt at koma á staðið og síggja og hoyra, hvat gongur fyri seg. Nú eru føroyingar so hepnir at hava eina boring á landi og hetta sera góða høvið heldur Alex Buvik, at vit eiga at brúka til okkurt skilagott, eitt nú til at geva føroyingum innlit í hesa fyri okkum heilt nýggju verð, sum oljuboring og forkanningar eru.

Vit spurdu Alex Buvik, um tað ikki hevði verið rætt at hildið slíkt skeið fyri øllum løgtingsmonnunum eisini. -Eingin ivi um tað, men vit skulu so byrja eina staðni. Seinni verður vónandi høvi at taka aðrar við eisini leggur hann afturat.

Ætlanin er at halda sjálvt skeiðið umborð á Teistanum bæði suður og norður, og harumframt verður so vitjað í Lopra, har høvið verður at síggja bortornið og tosa við fólk á staðnum.



*Alesx Buvik her saman við Martin Heinesen, leiðara á Oljufyrisitingini á boristaðnum í Lopra*

*Tíðindaskriv frá Føroya Skúlabókagrunni:*

## Heimssøga 1

*Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út »Heimssøgu 1« eftir Asle Sveen, Svein Aastad og Hans Jacob Debes. Heri Jacobsen hevur týtt og tillagað norska tekstin, og Martin Joensen hevur gjørt kápumyndina.*

Sum heitið sigur, er bókin ein heimssøga, og føroysk søga, sum jú er ein partur av heimssøguni, er tikin við á hóskandi støðum.

»Heimssøga 1« hevur undirheitið *Fyri ídnaðarsamfelagið* og viðger sostatt tíðarskeiðið frá elstu tíðum til ídnaðarkollveltingina.

Í bókini eru nógvar myndir, bæði litmyndir og svart/hvítar. Har eru fotomyndir, avmyndaðir málningar og tekningar. Nógv kort eru eisini í bókini.

»Heimssøga 1« er ætlað søguundirvísingini í 7. flokki og framhaldsdeild.

Hestprent hevur staðið fyri repro, umbróting og prentumsiting.

Bókin er 154 blaðsíður og kostar 150,00 kr.




Søkt verður eftir
**konufólki**
til rækju- og skeljavirki á Stykkishólmi í Íslandi frá 1. september til jóla. Virkið rindar ferðina, hús og arbeiðsklæðir.
Møguleiki er fyri at tosa við gentur, sum hava verið har yviri
**Arbeiðsávísingin.**
**Tlf. 19550**